


*Í dag eru tað hjúnini Høgni og Sonja Mikkelsen, sum reka el-fyritøkuna Einar Mikkelsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

avloysarastarv har.

Nógv nýtt kom fram innan el-yrkið, og Einar var altíð heitur talsmaður fyri at útbúgvingarnar í Føroyum skuldu verða eins og í Danmark. Hann bleiv í tí sambandi limur í danska el-innleggjarafelagnum ELFO (nú Tekniq), soleiðis at hann fekk í lag vitjanir og hjálp til útbúgvingarnar hjá el-lærlingunum, og var hann eisini ofta í Danmark til eftir-útbúgving og hevði eitt ótal av vinum innan el-yrkið í Danmark. Einar Mikkelsen andaðist 21.januar 1999, 82 ára gamal.

Einar, og Bente sum andaðist 2. januar 1986, fingu tvey børn, Høgna og Idu, og barnabørnini eru fýra í tali.

## Ættarliðsskifti í 1980

Í 1980 var ættarliðsskifti í fyritøkuni, tá sonurin Høgni B. Mikkelsen tók við sum stjóri, og rekur hann í dag virkið saman við konuni Sonju, sum eisini kemur frá einum heimi, har foreldrini Jeanne og Holger Jensen róku sína egnu fyritøku: Holger Jensens Møbilhandil í N. Finsensgøtu í Havn.

Høgni fór í læru sum elektr-ikari í fyritøkuni í 1964. Tá hann varð útlærdur í 1969, fór hann á el-innleggjaraskúla í Keypmannahavn og fekk prógv í 1973. Eins og pápin hevur Høgni eisini stóran áhuga fyri handverkarayrkinum og serliga el-fakinum. Hann var eitt langt tíðarskeið nevndarlimur og formaður í Havnar Handverks-meistarafelag, umframt at hann hevur sitið í stýrinum fyri Tekniska Skúla og Føroya Handverksmeistarafelag.

Síðan Einar Mikkelsen byrjaði í 1949 hava tilsamans 80 lærlingar tikið sína elektrikaraútbúgving á virkinum. Í dag starvast níggju fólk í fyritøkuni. Tá virksemið var upp á tað mesta vóru millum 22-25 fólk í starvi.



*Ein Ford Anglia vørubilur hjá Einari Mikkelsen*

Í sambandi við 60 ára stovn-ingardagin verður móttøka í hølum Havnar Arbeiðiskvinnu-felags í Bøgøtu 10 (við síðuna av Einar Mikkelsen Sp/f), fríggja-dagin 22. mai frá kl. 15-18.




*Í 1955 læt Einar Mikkelsen upp tann fyrsta handilin í Føroyum, sum burturav seldi lampur. Handilin var í húsunum høgrumegin. Til vinstru sæst blómuhandilin Blomsturbrá, sum var í grannahúsunum*